# TILTØK

**Frelsunarherurin, Tórsgøta 19**
Leygardagin kl. 11 Útifundur – um viðrar.
Sunnudagin kl. 11 Møti, kl. 14 Familju-útferð – um viðrar. Viðrar ikki til útferð verður møti kl. 18, Siv og Eyðfinn Joensen tala og leiða. Øll eru vælkomin.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis verður Barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli og kl. 12 eisini Møti, har Sverri Steintún talar. www.hebron.fo

**Meinigheitin í Hoyvík uppi á Brekku 3**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Rúna Rasmussen, kl. 22 Útimøti á Vaglinum – um viðrar.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bønarmøti.

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Egil Joensen.

**Samkoman Lívdin í Hoyvíkar skúla**
(inngongdin er flutt til nýggjaskúla).
Leygarkvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti. Vitjan verður av fólki frá »Doulos« og »Anastasis«.
Sunnumorgunin á Familjumøtinum kl. 10.30 talar Jógvan Z. um evnið: Truplir spurningar úr Bíbliuni »Hví líða rættvís menniskju?«
Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 luttaka Danjal og Synnøva av Rana.
Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúli kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini. www.livdin.fo

**Aglow, Tórshavn**
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið 12. juni kl. 19.30. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Filadelfia Landavegur 22**
Í dag kl. 20 Ungdómsmøti v/ Johan Petur Johannesen evnið er »Hvussu fái eg mest burturúr lívinum«.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Sam Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, ABC v/ Frank Jacobsen, evnið er: Fyrigeving við blóði Jesusar 2. partur, kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 19.30 Bønarskúlin og breakthrough worship. Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067. Telefonin svarar mán-frí frá kl. 8-16.

**Frá Ebenezer**
Sunnudag kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti. Øll eru vælkomin. www.ebenezer.fo

**Samkoman Rhema**
Sunnudagin Møti og Sunnudagsskúli kl. 11.
www.rhema.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa og barnadópur v/ Wladyslw Zdunek prest í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi.

**Meinigheitshúsið**
Fríggjakvøldið kl. 19.30-21 Juniorhugni.
Suinnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Kristian Davidsen, Barbara syngur.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Miðvágs Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Viðrar, verður skipa fyri útferð. Kl. 18 Møti. Hjartaliga vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við breyðbróting, Jón Miðberg talar. Verið hjartaliga vælkomin í Saron.

**Vestmanna missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við Jon Eli Johannesen úr Havn.

**Hvalvíkar Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Vík og Tjørnuvík**
Heimamissiónin hevur útimøti leygarkvøldið kl. 19 í Vík og kl. 21 í Tjørnuvík.

**Bygdarhúsið í Tjørnuvík**
Sunnukvøldið kl. 19 Møti, Regin Høgnesen talar, tórhild og Inga syngja og spæla. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Fríggjakvøldið kl. 20 Møti við Niels J. Nielsen, trúb. Aftaná møti verður drekka. Øll eru vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21.30 Praise expolsion á Eystanstevnu.
Sunnudagin kl. 17 Møti v/ monnum. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Aglow-møti**
verður í Stranda Sentrum leygardagin tann 12. juni kl. 15. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, har Thaborkórið eisini syngur.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 19 Møti við sangi og vitnimøti. Innsavnan í samband við toymisferðir til Kina/Ukraina, kl. 21 Ungdómsmøti.

**KFUM & K, Klaksvík**
Fríggjadagin kl. 22 Opið hús. Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti við Snorra Brend, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Getsemane, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Hugnaløta fyri ung.
Sunnumorgun kl. 11 Møti við Eivinn Bringsberg.

**Soli Deo Gloria**
Leygardagin kl. 15 Bíbliutími, evnið: Okkultisma, kl. 23 Ungdómskvøld í Skálanum.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ ungdómi úr Soli Deo Gloria.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið kl. 20. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Lærarahúsini í Svínoy**
Møti verður í lærarahúsinum fríggjakvøldið kl. 20 við ungum úr KFUM & K í Klaksvík. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og Lovsongsløta, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Aglow, Sandoy**
Aglow møti verður leygardagin kl. 20 í Samljóð við vitjan úr Havn, kvinnur og menn eru hjartaliga vælkomin. Samlað verður inn til Grønlandsferðina.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Útferð við Sunnudagsskúlanum verður sunnudagin kl. 14 frá Missiónshúsinum. Foreldur eru vælkomin at hjálpa til við koyring. kl. 18 Møti við Jeannu og Mouritz Viderø. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Fríggjadagin kl. 21 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 16 Útimøti uttanfyri Frelsunarherin. Møti fjølment!!!
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli – um viðrar fara vit útferð, kl. 18 Evangel. møti, Eddie Bech talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur, kl. 21 Útifundur – um viðrar. Ónsdagin kl. 20 Bønar- og uppbyggingarfundur.

**Sion, Vágur**
Sunnudag kl. 11 Morgunmøti kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøld kl. 21 Bønarmøti og Bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

**Missiónshúsið í Sumba**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Sigrid Ludvig og Denni Debes, Ebba og Nimrod syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Evangel. fundir í DK – Samkoman Malta**
Fríggjakvøldið 11. juni kl. 19.30 Evangel. fundur í Sædding Center, Sædding, Esbjerg.
Sunnukvøldið kl. 17 verður Evangel. fundur í Vejle Staldgårdsgade 4. Talarar: Levi, Rógvi og aðrir. Eftir fundin bjóða vit kaffi, har borðreitt verður við føroyskum viðskera. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagur 7. juni***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl og onnur spøl. Tilm. til døgurðan mikudagin, tlf. 316491.
**Tilhaldið á Sandi bjóðar okkum suður 28.-29. juni. Ymiskt verður á skránni, Bocciakapping. Kunningarstovan skipar fyri eini kvøldsetu í Dali. Tilmeld. 316491**
***Týsdagur 8. juni***
kl. 10-11.30 Felagssangur við starvsfólkunum á býráðnum. Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15-17 Opið hús
***Mikudagur 9. juni***
kl. 10-12 Vit gera døgurða í Tilhaldinum. Øll hjartaliga vælkomin at vera við.
kl. 14-16 Undirvísing í Boccia í kjallaranum
kl. 15 Túrur
***Hósdagur 10. juni***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-16 Boccia í kjallaranum
kl. 15 Tilhaldið Fløvin av Glyvrum vitjar
***Fríggjadagur 11. juni***
kl. 10-17 **Opið hús**
kl. 15.30 **Vitja »Seniorblásarar frá Odense.** Øll eru hjartaliga vælkomin.

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 13. juni verður gongutúrur úr Signabø-Kaldbak. Tungur túrur, gingið verður 3-4 tímar. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Havið heit og góð gonguklæðir og matpakka við. Tilmelding.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar**
*í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensionistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 1*5-18.
***Mánadagin 7. juni***
Fimleikur v/ Jóhannu Troest
***Týsdagin 8. juni***
Ítriv fyri áhugað
***Mikudagin 9. juni***
Boccia v/ Jóhan Danielsen
***Hósdagin 10. juni***
Til havnar vit fara…
Vit møta í Fløvanum kl. 9.45. Kostnaður kr. 100,-
***Fríggjadagin 11. juni***
Opið hús

*Tú fært altíð ein góðan drekkamunn, somuleiðis eitt gott Guðs orð. Bløðini eru altíð til taks.*

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla lærarаíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Fyribyrgingarráðið**
*Argjaboðagøta 7 · 160 Argir*
*postrúm 135 · 110 Tórshavn*
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.:
fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

**Lymfødemfelagið**
*Box 2113, FO 165 Argir*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Heilafelagið**
*felagið fyri apopleksi- og afasirakt*
Íslandsvegur 10 · tlf. 321520
T-post: heila@post.olivant.fo

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

**Javni**
*Hoydalsvegur 40 · 3 hædd*
Skrivstovan hjá Javna er opin týsdag til fríggjadag frá kl. 10-14.
Tlf. nr. 314827 · faks 310557.
Vit hava eisini eina heimasíðu: www.javni.fo
og t-post adressu:
javni@post.olivant.fo har tit altíð eru vælkomin at senda spurningar ella viðmerkingar.



## FILMSTEIGURIN

# Harry Potter – og fangin frá Azkaban

Eftir eina heldur óhepna hending í summarfrítíðini hjá Dursley húskinum, har ein irriterandi gumma provokerar Harry eitt lítið sindur ov nógv, flýggjar





Potter út í náttina, har hann verður tikin til ráðharran fyri gand. Men hóast hann roknaði við nøkrum øðrum, so verður Harry ikki revsaður fyri sína nýtslu av gandi. Hann sleppur við eini ávaring, men eisini hetta hevur sínar orsøkir. Lívshættisligi gandakallurin, Sirius Black, sum var við í leikinum, tá foreldrini hjá Harry vórðu myrd, er flýggjaður úr Azkabanfongslinum, og alt bendir á, at hann leitar eftir Harry í royndunum at gera verk sítt liðugt. Samstundis eru fleiri nýggir lærarar komnir á skúlan. Hóttandi Dementorar ansa skúlanum, um Black skuldi funnið vegin fram, men hesir taka at kalla alla megi úr Harry. Men so taka Harry, Ron og Hermione málið í egnar hendur, og so kemur ferð á.





**Frumsýning – Billettprísur: 70,- kr.**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 11.06. | kl. $16^{30}$ | Fríggjadagin | 11.06. | kl. $19^{45}$ |
| Fríggjadagin | 11.06. | kl. $23^{00}$ | Leygardagin | 12.06. | kl. $16^{30}$ |
| Leygardagin | 12.06. | kl. $19^{45}$ | Leygardagin | 12.06. | kl. $23^{00}$ |
| Sunnudagin | 13.06. | kl. $16^{00}$ | Sunnudagin | 13.06. | kl. $19^{15}$ |
| Sunnudagin | 13.06. | kl. $22^{30}$ | | | |

P BIO KIOSKIN P
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.

HAVNAR BIO
P Tlf. 311956 P
www.bio.fo




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 11.06. | kl. $18^{00}$ | Fríggjadagin | 11.06. | kl. $23^{30}$ |
| Leygardagin | 12.06. | kl. $18^{00}$ | Leygardagin | 12.06. | kl. $23^{30}$ |
| Sunnudagin | 13.06. | kl. $21^{30}$ | | | |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 11.06. | kl. $20^{45}$ | Leygardagin | 12.06. | kl. $20^{45}$ |
| Sunnudagin | 13.06. | kl. $18^{45}$ | | | |

**KOMANDI FILMAR**




**Frumsýning fríggjadagin 18.06**




**Frumsýning fríggjadagin 18.06**